VERILSIR Í HAVN TIL LEIGU
Tvey verilsir 20 og 18 kvm. til leigu beinanvegin. 2.600 kr. og 2.400 kr. við ljós og hita. 2 mðr. leiga krevst. Felags tekøkur og boð fyri hesi bæði. Skriva ella gev tlf. nr. til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1296-2

YNSKIST
Kamar ynskist.
Tlf. 253208

SETHÚS Í VÁGI TIL SØLU
Húsini standa uppi í Gjógvarabø, eru í góðum standi og standa í góðum umhvørvi við sera góðum útsýni yvir bygdina og Vágs fjørð. Byggiár 1988. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Áhugað kunnu ringja
Tlf. 374025, e. kl. 17

KAMAR/ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu til 28 ára gamlan drong. Tað skal vera í Havn ella í Eysturoynni. Hevur fast arbeiði.
Tlf. 260241

ÍBÚÐ YNSKIST Í KBH.
Er nakar, ið hevur eina íbúð/kamar at framleiga mær í tíðarskeiðnum 1. mai til 15. nov. Kostnaður helst undir 3.000 kr.
Tlf. 458190 / 264726, Barbara

HØLI Í HAVN YNSKIST
til leigu. Skal brúkast til tónleikavirksemi, undirvísing og venjing.
Tlf. 226242

ÍBÚÐ ELLA HÚS YNSKIST
Par við tveimum børnum (3 og 15 ár) ynskja íbúð ella hús til leigu í Havn, á Argjum, í Hoyvík ella á Hvítanesi, Kollafirði ella Velbastað. Vit gjalda til tíðina og fara væl um.
Tlf. 311747/256887

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par við lítlari dóttir ynskir íbúð í høvuðsstaðarøkinum. Hava fast arbeiði og fara væl um.
Tlf. 252803

Dýr

HUNDAHVØLPAR
7 vikur gamlir Border Collie hundahvølpar kunnu fáast. Duga at eta og leppa. Bert til djóravin.
Tlf. 444031

VATNSKJALDBØKA
verður latin økeypis til djóravin.
Tlf. 328019 ella 255219

AKVARIUM
20 x 20 x 40 cm. til sølu + 2 gullfiskar. Pumpa fylgir við fyri 350 kr.
Tlf. 253157, Marie

UNDULATAR
Tvey undulatapør í hvør sínum búri við nógvum tilhoyri til sølu.
Tlf. 312729, e. kl. 17

YNSKIST
Er nakar, ið hevur eitt 200 litrar akvarium at selja mær, so ring
Tlf. 313105 ella 258143, Bjarti

HUNDUR
verður latin djóravini.
Tlf. 310183

Fundir

ÁRSAÐALFUNDUR
Eldrafelagið Vesturskin hevur ársaðalfund í skúlanum í Vestmanna tann 18. mars kl. 19.
Nevndin

EYKAÐALFUNDUR
Føroya Kavarafelag hevur eykaaðalfund 19. mars kl. 15.00 í holum Føroya Handverkarafelag, Tinghúsvegi 18. Til viðgerðar verður møguligur limaskapur í Føroya Handverkarafelag. Allir limir eiga at møta. Nýggir limir kunnu tekna seg.
Nevndin

SEYÐUR OG SEYÐAHALD
Mikukvøldið 13. mars kl. 20.00 í Norðskála-Oyrar skúla. Helgi í Brekkunum greiðir frá. Øll eru vælkomin.
Sunda bókasavn

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
kemur saman hóskvøldið 14. mars kl. 19.00 í Losjuni, Tinghúsvegur 18, til vanligan fund.
Nevndin

HÚS TIL SØLU

Mál nr. 177
Adr. Fagralíð 6, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 88 m² x 2 + loft, hjall og garagu
Stødd á grundøki: 337 m²
Byggiár: 1972
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 209
Adr. 430 Hvalvík
Stødd á sethúsum: 16,5 x 8,5 m x 2 (eisini fastbygdur hjallur uml. 4 m²)
Stødd á grundøki: 669 m²
Byggiár: 1982
Kostnaður: Um hóskandi boð fæst

Mál nr. 228
Adr. Rygsgøta 6, Hamarin, 160 Argir
Stødd á sethúsum: 120 m² í tveimum hæddum
Stødd á grundøki: 500 m²
Byggiár: 1993
Kostnaður: Ynskja kr. 1.800.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 229
Adr. A. C. Evensensgøta 1, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: Uml. 85 m² x 3 og 100 m² x 2
Byggiár: 1948
Kostnaður: Kr. 3.000.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 231
Adr. 388 Mykines
Stødd á sethúsum: Uml. 120 m² í trimum hæddum
Stødd á grundøki: 87 m²
Byggiár: Eldri sethús
Kostnaður: Kr. 500.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 234
Adr. Landavegur 7, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: Uml. 100 m² í tveimum hæddum + loft
Stødd á grundøki: Uml. 100 m²
Byggiár: 1900
Kostnaður: Hóskandi boð

Mál nr. 237
Adr. Berjabrekka 45, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 118 m² + hjall og súkkluskúr
Stødd á grundøki:
Kostnaður: Kr. 1.200.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 238
Adr. Traðargøta 13, Argir
Stødd á sethúsum: 65 m² + loft
Stødd á grundøki: 179 m²
Kostnaður: Kr. 1.200.000,- ella hægsta boð yvir

Ætla tygum at selja ella keypa hús, vilja vit fegin hjálpa tygum

GRUNDØKI OG JØRÐ

Mál nr. 545
Adr.: Rasmussargerði, Skála
Vídd á grundøki: 1478 m²
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 551
Adr.: Uti á Fløtum, Norðoyri
Vídd á jarðarøki: 1 gyllin uttangarðs og 1181 m² innangarðs
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 552
Adr.: Mikkjalstrød, 100 Tórshavn
Vídd á grundøki: 664 m²
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Mál nr. 553
Adr.: á Hjalla, 188 Hoyvík
Vídd á grundøki: 1500 m²
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

Vit hava eisini onnur sethús, sum ikki eru lýst í blaðnum. Støkk inn á gólvið.

Húsamekling
Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
www.husamekling.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16

Húsarhaldstól

KOMFÝRUR TIL SØLU
Ein brúktur el-komfýrur bíliga til sølu. Eisini er eitt hvítt hondvask til sølu og ein radiatorur.
Tlf. 311199

KOLKOMFÝRUR
Kolkomfýrur til sølu.
Tlf. 215479

KULDASKÁP
av merkinum Atlas til sølu fyri 500 kr. Stødd: 106 x 55 x 60 cm.
Tlf. 320294

FRYSTIBOKS
Nýggj Vestfrost boks, næstan óbrúkt, 200 litrar, bíliga til sølu.
Tlf. 448210

YNSKIST
Vaskimaskina ynskist til keyps.
Tlf. 224406

BRÚKT ZANUSSI EYMHETTA
til sølu.
Tlf. 213272

Innbúgv

GOMUL SOFA
fæst við at heintast. Ein grulvigarður til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 256507

TIL SØLU
Køkur til sølu.
Tlf. 315656, Dagfinn Arge

TIL SØLU
Nýggj, svørt leður hornasofa, sofaborð og tvey klædnaskáp til sølu vegna flyting.
Tlf. 332404 / 260004, e. kl. 18

TIL SØLU
1/2 ára gamalt kakla sofaborð til sølu. Kostaði nýtt 2.400 kr. selist nú fyri kr. 1.000. Stødd: 70 x 140 cm.
Tlf. 313601

LEÐURSOFA
Brún leðursofa 3 pers., 180 cm. til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 317564

TIL SØLU
Jensen boxmadrassa 120 x 120 við toppmadr. og boylum til sølu vegna flyting fyri kr. 3.000,- Nýprísur 7.000,- kr.
Tlf. 250868 ella 316817

BRIKS TIL SØLU
Ungdómsbriks, ljós – kann gerast dupult – til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 447575

HANDILSINNBÚGV TIL SØLU
1 Kassaslúsa, 1 parti av hillum, skinnarum og hilaberarum.
Tlf. 313804, Ternubúðin

BRÚSUKABINA
80 x 80 cm. v/ blandingsbattarí, karrylitað, bíliga til sølu.
Tlf. 443328

TIL SØLU
So gott sum nýggj sovisofa, 1.000 kr., og tvey sofaborð bíliga til sølu.
Tlf. 317114 / 217114

YNSKIST
Hornasofa ella sofasett ynskist til keyps.
Tlf. 224406

Leikur

TIL SØLU
Ein rúgva av bilum til sølu fyri einans 200 kr. tilsamans.
Tlf. 317810 ella 217810

Lutaseðlar

9. B
í Tórshavnar kommunuskúla. Hesi nr. hava funnið í lutaseðlasøluni: 1) 0456, 2)3646, 3) 3607, 4) 2492, 5) 0095. Hjartaliga takk fyri stuðulin.

Pløgg

HEVUR NAKAR
ein konfirmatiónsniðurdeil – síðan við flesum – std. 36 at selja ella læna okkum til 7. april.
Vinarliga ring 448502 ella 219277

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
Lilly model, std. 38 jakki til std. 40, skógvar std. 39, til sølu.
Tlf. 316115

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
(stødd L.) við stroppum, cardigan, skógvar (stødd 41) handskar, til sølu.
Tlf. 256181

TIL SØLU
Konfirmatiónskjóli, Lilly modell, std. 36, og skógvar, std. 37, til sølu.
Tlf. 310490 ella 260540

Samband

SAMBAND YNSKIST
Einligur maður í 30-unum ynskir at koma í samband við 30-39 ára gamla kvinnu. Býr í Norðoyggjum. Hevur fasta inntøku. Er erligur og hjálpsamur. Vinarliga send mynd av tær við í fyrsta brævi. Send brævið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 303

SAMBAND YNSKIST
Eg eri einligur, 60 ára gamal maður. Eg ynski at møta einum konufólki úr Suðuroynni. Eg sakni eina at deila upplivingar og hugna mær við. Er hetta nakað fyri teg, so skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 247

HELLO!
I'm Lisa Rotvold Nilssen from Norway and I collect pens/pencils, I already have a few thousand. I have been collecting PENS with advertisment/company names or marks on for many years now. And I have a dream of getting pens from all over the World.All I ask from you are to send me some pens from Your Company/School etc. Up till now most of those pens are from Norway! So it would be great if you could help me collecting pens from all over the world. It does not matter whether they are new or old, whether they write or don't. So if you have any pens at your work, in your house, or with your friends I would be wery happy if You send me some. Lisa Rotvold Nilssen, Antenneveien 23, 9017 Tromsø/Tromsoe, N-NORWAY – lisaro@online.no – lisarn@breivika.vgs.no
http://home.online.no/~lisaro/

Sjavs

SJAVSKAPPING
FM kapping í sjavs verður í ítróttarhøllini í Runavík leygardagin 16. mars kl. 15. Tilmelding ikki neyðug. Shell stuðlar kappingini.
NSÍ

ALMENN SJAVSKAPPING
verður á Kafé Blákross týsdagin 12. mars kl. 19.00.
Kafé Blákross

SJAVSKAPPING
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.30.
LÍF

FØROYAMEISTARA KAPPING
verður í høllini í Runavík 16. mars kl. 14.00.
N.S.Í.

Súkklur

DREINGJASÚKKLA
1dreingjasúkkla, Rocky Casino 24" – 15 gear, selist fyir 800 kr. 1 ára gomul.
Tlf. 322193

DREINGJASÚKKLA
Svørt dreingjasúkkla av slagnum Rocky, 20" – 3 gear, verður seld fyri 700 kr.
Tlf. 322193

GENTUSÚKKLA
til sølu fyri 100 kr.
Tlf. 317564

SÚKKLA TIL SØLU
Damusúkkla til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 317564

TIL SØLU
Kreidler RMC, 3 gear, til sølu til hægstbjóðandi. Krevur ábøtur. Nógvir eykalutir fylgja við.
Tlf. 333065, e. kl. 17

YNSKIST
Hevur nakar eitt prutl av slagnum Jawa, 50 cm, at selja mær bíliga sum eykalutir, so vinarliga ring
Tl. 260022, e. kl. 15

Teldur

TELDA TIL SØLU
Hewlett Packard VL600 telda til sølu: P III, 733 MHz, Matrox G400, 128 MB RAM, 75.8 GB HD, 17" Hitachi monitor, HP brennari, DVD, disklastað, hátalarar, minitower.
Ring 311570

TELDA TIL SØLU
1000 MHz, Thunderbird, 512MB RAM, 61.5 GB harddisk, DVD-ROM, Geforce2 grafikkort, mús, knappaborð, disklastað, windows XP, Office XP og spøl sum Medal of Honor Allied Assault, Champions Manager 2001-02 og nógvir filmar sum The Lord Of The Ring og Spy Game, til sølu fyri 7500kr.
Tlf. 32876726

TIL SØLU
Ein fartelda K6.2 333 Mhz, 128 MB RAM, 13,3" TFT skerm og modem til sølu fyri uml. kr. 6.000.
Tlf. 211990

TELDA TIL SØLU
800 MHz CPU, GeForce 3 Deluxe, 512 mb 133 RAM, 38 GB harðdiskar, SB Live, 17" skerm, brennara, video in/out, Firewire, WinXP oma. Prísuppskot kr. 9.000,-.
Tlf. 310441

MOTHERBOARD
Hevur tú uppdaterað telduna? Sel mær títt gamla motherboard og prosessor.
Tlf. 421698 Johan

PLAYSTATION TIL SØLU
Playstation til sølu, 10 spøl fylgja við og eitt Memory kort.
Tlf. 256900

TIL SØLU
Ein góð skúlatelda við tekstviðgerð, bíliga til sølu.
Tlf. 251221 ella 313596

FARTELDA
Compaq, 466 MHz, 192 MB ram, TFT skærm, modem, DVD-drev. Kvalitet. Kraftig nok til alle dine programmer. Prøv den og bliv overbevist! Nypris for 17 måneder siden: 13.999 kr. Pris nu: 7.999 kr.
Tlf. 371843

CD-BRENNARI
Ein 40/24/12 liteon cdbrennari, »brennur 24x, lesur 40x, endur lesur 12X«, til sølu fyri kr. 1800.
Tlf. 313471

DVD AVSPÆLARI
Nú er møguleiki at keypa kodufrían DVD avspælara incl. 5 filmar fyri 3700,00. Áhugað skriva til
hans-ei@post.olivant.fo

TIL SØLU
Hewlett Packard VL600 telda til sølu: 128 MB RAM, 75.8 GB HD, 17" Hitachi monitor, HP brennari, DVD.
Ring 311570

Tónleikur

FORSTERKARI
Hevur nakar ein rør-forsterkara – helst Fender – at selja mær? Standur ongan týdning, gjarna defektur.
Tlf. 332025 ella 214025

ANLEGG TIL SØLU
Pioneer CD-spælari við 2 150 w FBL hátalarum, 4 mör. gamalt til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 264566 ella 225470

KNAPPAHARMONIKA
til sølu, um hóskandi boð fæst. Merki: Elkavox.
Tlf. 441182

TIL SØLU
Eitt Kawai orgul, hevur 2 manualir og fótpedal. Bíliga til sølu. Gev eitt boð.
Tlf. 441800

TIL SØLU
Korg Tirinity TR-RACK synth-ljóðmodul við 512 ljó?um + 512 combiljóðum til sølu. Útmerkaði klaver ljóð, góð el-pianoljóð, sera góð synthljóð, strings og bassljóð, sera góð og modernaði trummuljóð, 4 sera vælljóðandi stereo effektprosessorar við 47 effektum og 4 send til hvørt ljóð. T.d. compressara, gittarforsterkara eftirlíkning, rúmklang, chorus, flanger, EQ og nógvar aðrar. 4 outputs. Stórt display. Ljóðeditor program til PC fylgir við. Stutt sagt: eitt SUPER modul. Sær út sum nýtt. Nýprísur 12.000,-, til sølu fyri 8.000 kr. Tlf. 210328
e-mail: drewsen@mac.com

TIL SØLU
Ein Honer piano harmonika bíliga til sølu.
Tlf. 456787 ella 216787

GUITAR TIL SØLU
Ovation 12 streingir v/ forsterkara + kassa bíliga til sølu.
Tlf. 224259

B&O-ANLEGG
Radio v/ bandavspælara og tveimum 60W hátalarum, + ein Sony discspælari bíliga til sølu.
Tlf. 317348

Ymiskt

HEVUR
nakar ein flogferðaseðil – einvegis – til Keypmannahavnar umleið 20.-25. mars, so vinarliga ring
tlf. 373169 ella 250213

PICASSO OG DALI
Verk av Pablo Picasso og Saldador Dali til sølu um áhugi er. E-mail: carlsson@post.olivant.fo
Tlf. 250485, Eyðálvur Carlsson

JØRÐ TIL SØLU
Grundøki í Trongisvági til sølu – 1180 kvm. Meira fæst at vita við at ringja á
tlf. 372182 ella 214032

PÁSKA-/VÁRSØLA
Páskasøla, tombola og kaffisøka verður á Verkhúsinum Stiggjur í Saltangará fríggjadagin 22. mars frá kl. 14-18.
Verkhúsið Stiggjur

NORRØNT
Norrønt Trædreviseminar 2002 verður í Stavanger í Noregi tann 7.-9. juni. Tilmeldingarfreistin er 1. apríl 2002. Skrá og tilmeldingarblað fæst hjá: Føroya Heimavirkisfelag Postboks 1209 110 Tórshavn ella hjá: Norges Husflidslag: E-postur: kirsten@husflid.noHeimasíða: www.husflid.no
tlf. 265003, E-postur: fhf@craft.fo

NORRØN HEIMAVIRKISLEGA 2002
Norrøn Heimavirkislega 2002 verður hildin í Havn á Skúlaheiminum hjá Tekniska Skúla 7.-13. juli.Tilmeldingarfreist 31. mars. Skrá og tilmeldingarblað fæst við at venda sær til: Føroya HeimavirkisfelagPostboks 1209 110 Tórshavn
tlf. 265003 ella e-post: fhf@craft.fo

FURUGÓLV FÆST
Lútað furugólv ca. 30 kvadratmetur fæst við at taka tað av.
Ring 320220 aftaná kl. 18.00

TIL SØLU
Nógv garn til sølu, stokkar og uppskriftir fáast ókeypis. Kopi av ymiskum til at klippa fæst eisini.
Tlf. 317810 ella 217810

EYRUR OG MOLD
kann fáast til vega við avheinting eftir nærri avtalu.
Tlf. 320472

JØRÐ TIL SØLU
Uppi á dalinum í Skopun, 7500 fermetrar. Nærri at vita á
Tlf. 361810

ERICSSON T68
Lítil fartelefon við litskermi, GPRS, WAP, vibrator, spølum, kalendara, e-mail og nógv meiri. Selist fyri 3.700 kr. Nýprísur 5.000 kr. Betri fartelefon fæst ikki. Tlf. 004551900522, e. kl. 11
kd@post.olivant.fo

FARTELEFON TIL SØLU
Lítil Motorola GSM fartelefon sera bíliga til sølu. Billadari fylgir við.
Tlf. 256900

HYGG HER!
5 metur gardintoy, vínreytt, til sølu fyri 200 kr. vegna feilkeyp. Ein gomul avsýrað reol til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 424567

FERÐAST SAMAN!
Eg søki eftir einum at ferðast saman við 18.-25. mars við Atlantsflog til Aberdeen.
Tlf. 361394

BROTFLÍSAR
Er nakar, sum eigur einar 25 fermetrar av brotflísum at lata mær?
Tlf. 212163

DYKKARA ÚTGERÐ
Drakt o.a ynskist bíliga til keyps. Liggur tú inni við onkrum so ring á
tlf. 252221

TIL SØLU
Absolut billigt! Mamiya 645 mellemformat kamera i perf. stand. Prisme & skakt søger. 2 x teleconverter, 45mm f 2.8, 80mm f 2.8, 150mm f 4, 210mm f 4, modlysblænder & kuffert – kr.6.500. e-mail: moforj@moes.hum.au.dk
tel. 2384 1915

BRÚKTUR BRÚSUBAKKI
til sølu. Mát 90 x 90 cm.
Tlf. 213272

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK

AUTO
311234

Framhald av síðu 30

hvørt ár. Eisini vænta oljufeløg, tá tey fara undir leiting í nýggjum londum, at leitingarøki javnan verða boðin út, soleiðis at tey kunnu hava eitt støðugt virksemi.

Tað er ov tíðiliga at siga nær eitt nýtt loyvisumfar skal setast í verk í Føroyum. Í frágreiðingini verður nevnt, at tá 3 ár eru farin frá loyvisveitingini, skal støða takast til, um loyvishavarar, ið sita við 9 ára loyvum, ætla at halda fram við leitiboringum ella teir lata alt loyvisøkið aftur til myndugleikarnar. Eftir hetta, tvs. á heysti 2003, er rættiliga gott grundarlag fyri at meta um eitt nýtt útbjóðingarumfar. Roknast má við, at annað útbjóðingarumfar verður sett í verk í komandi valskeiði.

Tað er ikki óhugsandi, at oljufundurin hjá Faroes Partnership liggur tvørtur um landgrundsmarkið millum Føroyar og Bretland. Um so er, skulu føroyskir og bretskir myndugleikar gera eina avtalu landanna millum, sum m.a. skal gera av, hvaðani fundurin skal troytast, hvussu hann kann býtast, osv. Í hesum sambandi er umráðandi, at oljumyndugleikin mennir sín førleika, soleiðis at føroysk áhugamál kunnu liggja í tryggum hondum.

Um úrslitið av oljufundinum í summar ikki vísir seg at goyma rakstrarverðar nøgdir, fer tað at ávirka vónirnar til at finna olju í djúpari fláunum aðrastaðni á landgrunninum. Avbjóðing hjá oljumyndugleikunum verður tá at tryggja ein framhaldandi áhuga fyri føroyska økinum.

Kolvetnisráð

Í løgmansreðuni 2001 verður víst á, at oljumálaráðharrin hevði ætlanir um at seta eitt kolvetnisráð at veita landsstýrinum og umsitingini góð ráð í samband við tær oljupolitisku avgerðirnar, sum skulu takast í sambandi við kolvetnisframleiðslu á landgrunninum. Henda ætlanin bygdi á, at vit høvdu ta fatan, at um olju og gass vórðu funnin í teimum leitimiðunum, ið størstar vónir vórðu settar til, ætlaðu loyvishavararnir undir framleiðslu sum skjótast. Oljufundurin hjá Faroes Partnership skal hinvegin kannast nærri, áðrenn støða verður tikin til møguliga framleiðslu. Tí segði Eyðun Elttør, at hann hevur gjørt av at bíða við at seta kolvetnisráðið. Hann heldur tó framhaldandi, at tað er týdingarmikið at skipa eitt tílikt ráð í góðari tíð, áðrenn stórar oljupolitiskar avgerðir um leiðbygging og flutningskervi skulu takast.

Seinastu árini hevur nógv verið tosað um tey árin, ið ein oljuvinna kann hava á okkara samfelag. Øll samfeløg eru í støðugari broyting, og roknast má við, at oljuvinnan kann verða við til at skunda undir nakrar broytingar hjá okkum. Undan oljuskeiðunum, sum higartil hava verið, hevur verið mett um ta ávirkan, sum virksemið kann hava. Landsstýrismaðurin mælir tí til, at beinleiðis árinskanningar av oljuvirkseminum verða framdar, tá ymiskar oljupolitiskar avgerðir viðvíkjandi framleiðslu verða tiknar, tí ein møgulig ávirkan er tætt knýtt at sjálvum avgerðunum. T.d. er alstórur munur á samfelagsávirkanini, um vit velja at taka olju upp í Føroyum heldur enn at flyta hana til eitt grannaland. Samfelagsgranskingin sum heild eigur kortini at verða styrkt, soleiðis at kanningar kunnu verða settar í verk, sum eru ein fortreyt fyri at skilja tær broytingar, sum fara fram í einum og hvørjum samfelagi til eina og hvørja tíð.

Framtíðar avbjóðingar

Í sambandi við framtíðar avbjóðingar nevndi landsstýrismaðurin, at síðani oljukeldurnar bretsku megin markið vóru funnar í fyrru helvt av 90unum, hevur umfatandi leitivirksemi á Atlansmótinum ikki fört til væntaða úrslitið. Kortini vóru vónirnar til leitiboringar á føroyska landgrunninum stórar í oljuvinnuni sum heild, tí saman við onkrum boringum bretsku megin markið, vóru hesar boringar ætlaðar at troyta nøkur av teimum mest vónríku leitimiðunum, sum eru kortløgd á økinum seinastu árini.

-Við oljufundinum hjá Faroes Partnership kann sigast at oljuleiting á okkara leiðum stendur á einum vegamóti, har úrslitið av fundinum kann fáa stóra ávirkan á gongdina framefitir. Tá tað er sagt, eigi eg kanska eisini at siga, at fyristøðufelagið framhaldandi er vónríkt um fundin teir gjørdu seinasta heyst.

Í seinasta lagi í summar skal Faroes Partnership lata oljumálastórinum frágreiðing, sum nágreiniliga skal lýsa boriúrslitið og hava eina ætlan um, hvørji tiltøk og arbeiði loyvishavarin vil seta í verk fyri at staðfesta, um farast kann undir framleiðslu av kolvetnum úr fundinum.

Um hesar metingar vísa, at lønandi framleiðsla kann spyrjast burturúr, fer tað at seta krøv um serliga vitan innan ávísar partar av tilfeingisumsitingini, t.d. jarðgoymsluverkfrøði, ið skal tryggja eina fullgóða troyting úr kolvetnisfundinum. Tá talan er um fullgóða troyting, kann verða lagt afturat, at tilfeingismyndugleikin og oljufeløgini ikki altíð hava somu áhugamál í hesum sambandi, og tí er umráðandi við slíkari serfrøði í umsitingini segði Eyðun Elttør í framløgurøðu síni.

Føroysk luttøka – royndarár

Oljuleitingin seinasta ár má partvíst metast sum eitt royndarár, tá um vinnuluttøku ræður. Sjálvt um røddir hava verið frammi, sum ikki eru nøgdar við samlaðu føroysku luttøkuna, haldi eg, at árið sum heild royndist væl. Afturmeldingarnar, sum vit hava fingið frá oljufeløgunum, vísa eisini, at tey eru væl nøgd við tað arbeiðið, sum føroyskar fyritøkur og føroyingar hava gjørt vísti Eyðun Elttør á.

Hann segði, at vit mugu minnast til, at treytirnar um føroyska luttøku onki siga um, at oljufeløgini skulu brúka eitt ávíst prosenttal av vørum og tænastum úr Føroyum. Slíkar ásetingar høvdu neyvan verið í samljóði við nútímans handilsavtalur við onnur lond. Uttan iva er komið fyri, at oljufeløg hava valt útlendskan veitara fram um føroyskan, men hetta eru viðurskifti, sum uttan iva fáast í rættlag, tá virksemið á føroyska landgrunninum gerst meira støðugt.

Enn eru endaliga uppgerðirnar fyri, hvussu nógvan penging oljufeløgini hava lagt eftir seg í samband við leitingarnar í fjør, ikki tøkar. Fyribils uppgerðir vísa, at umleið 150 milliónir kr vóru nýttar í Føroyum. Hetta svarar til umleið 25% av samlaða kostnaðinum fyri boringarnar. Ein stórur partur av hesi upphædd varð nýttur til tyrlu- og vøruflutning, og tí má roknast við, at stórar upphæddir fara av landinum aftur.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg